gult2 cyan2 magenta2 svart2






gult3 cyan3 magenta3 svart3



# Gera kanningar í Leirvíksfirði

**Landsverkfrøðingurin er nú farin undir seismiksar forkanningar í Lorvíksfirði**

TUNNIL
*Eyðun Klakstein*

Í gjár fór Landsverkfrøðingurin undir arbeiðið at gera seismiskar forkanningar í Leirvíksfirði, har undirsjóvartunnil møguliga skal gerast.

Landsstýrismaðurin hevur skundað undir hesa kanningar, so tær kunnu verða lidnar, áðrenn arbeiðið at gera Vágatunnilin verður liðugt.

Kanningararbeiðið í Leirvíksfirði heldur fram til síðst í juli mánaði, og Landsverkfrøðingurin hevur sent út eina ávaring um, at skip og bátar mugu ansa eftir, tá tey sigla í Leirvíksfirði komandi mánaðin.

Arbeitt verður við viðbreknari útgerð, og tí er neyðugt hjá skipum at ansa eftir.

Arbeiðuð fer fram frá Hagaleiti og norður móti Leirvíkar bygd og so tvørtur um fjørðin móti Borðoynni.

# Útskifting í sjónleikarfelagnum

**Nýggj nevnd var mánakvøldið vald í Klaksvíkar Sjónleikarfelag**

SJÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Mánakvøldið fór øll nevndin í Klaksvíkar Sjónleikarfelag frá, og nýggj fólk eru komin til.

Seinastu árini hevur nevndin roynt at fingið tak á støðuni í felagnum, sum fekk fíggjarligar trupulleikar av stóru umbyggingini av Atlantis.

Ein loysn er funnin á hesum trupulleikum, so Klaksvíkar Sjónleikarfelag ikki longur stendur fyri rakstrinum av Atlantis, men hinvegin fer at leiga seg inn. Klaksvíkar Sjónleikarfelag hevur júst gjørt leigusáttmála við stýrið fyri Atlantis.

Í gomlu nevndini, sum nú takkaði fyri seg, sótu Gunnar Nolsøe, Adelborg Linklett, Bjarni Ziska Dahl, Fróði Sundskarð og Leif Eliasen.

Nýggju fólkini, sum framyvir skulu mynda leiðsluna í felagnum, eru Katrin Ósá, Per Johannesen, Hans Hjalti Skaale, Petur Eliasen og Hans Jacob Heinesen.

Nevndin hevur ikki skipað seg enn.


*Gamla nevndin í Klaksvíkar Sjónleikarfelag legði mánakvøldið frá sær, og nýggj fólk eru komin í nevndina*


*Todi Jónsson skrivaði autografar, tá hann vitjaði í Klaksvík týskvøldið*

# Todi heiðraður í Klaksvík

**Týskvøldið vitjaði Todi Jónsson í Klaksvík, har hann varð heiðraður av børnum og vaksnum**

VITJAN
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Fremsti føroyski fótbóltsspælari, Todi Jónsson, var týskvøldið á vitjan í heimbýnum.

Tað var Statoilstøðin í Klaksvík, sum hevði fingið Toda til Klaksvíkar, har fólk fingu høvi at ynskja honum tillukku við danska meistaraskapinum, sum hann vann herfyri.

Nógv fólk nýtti høvi at heila uppá fótbóltsspælaran, sum spældi nógv av barnaárunum og nøkur av vaksnamannaárunum við KÍ. Í 1993 flutti hann til Havnar at spæla við B36 í hálvt ár, og síðani fór hann til Danmarkar, hann síðani hevur spælt fyri Lyngby og FC Keypmannahavn.

Hetta er fyrsta meistaraskapið, sum Todi vinnur, síðani hann fór til Danmarkar at spæla. Áðrenn hann fór til Danmarkar vann hann FM-heitið í KÍ.

# Prógv á Tekniska Skúla í Klaksvík

Í vikuni vóru prógv handað 9 SIT- og 11 HT-næmingum á Tekniska skúla í Klaksvík.

Hetta fór fram á eini hugnaløtu á skúlanum við livandi tónleiki og røðum. Gestarøðarin í ár, var Hjørdis Gaard, cand.scient pol., ið starvast sum fulltrúi á Samskiftisdeildini hjá Vinnumálastýrinum.

Næsta skúlaár á Tekniska Skúla byrjar 13. august. Vit frætta frá skúlanum, at tilgongdin er vaksin rættuliga nógv. Tað eru fleiri enn 50 næmingar, sum hava skrivað seg inn til SIT- og HT-útbúgvingina.


*HT-næmingar á Tekniska skúla í Klaksvík. Standandi frá vinstru: Árant Berjastein, Fuglafjørður, Dávið Sundsskarð, Klaksvík, Svend Hansen, Klaksvík, Bergar Juul, Fuglafjørður, Atli Jacobsen, Klaksvík, Jaspur Guttesen, Tórshavn og Ingolf Gaard, Klaksvík. Húkandi frá vinstru: Ragnar Joensen, Lambi, Jens Pauli Joensen, Klaksvík, Jógvan R. Simonsen, Klaksvík og Eskild Norðbúð, Klaksvík.*


*SIT-næmingar á Tekniska skúla í Klaksvík. Standandi frá vinstru: John Johannesen, Frank Matras Schmidt, Levi Sevdal, Jón Hardy Viðbjørg, Árni Elttør, Svend Juul Rasmussen, Leif Johannesen og Pætur Klein Jacobsen. Óli Samuelsen væntar á myndini*